# Áhugi er fyri gamla Snikkaravirkinum

**Gamli Timburhandilin ella Snikkaravirkið á Kambsdali, sum bygningurin eisini verður róptur, er lýstur til sølu. – Áhugi er fyri bygninginum, og vit hava fingið eini 2–3 rímiliga ítøkilig boð, sigur borgarstjórin í Fuglafjarðar kommunu, Sigurd Simonsen**

KAMBSDALUR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Í sambandi við fíggjarætlanina hjá Fuglafjarðar kommunu fyri 2006, hevur bygdarráðið samtykt at selja gamla Timburhandilin ella Snikkaravirkið á Kambsdali.

Kommunan yvirtók bygningin, tá ið Havnar Timburhandil bygdi nýggjan bygning á Kambsdali, og síðan hava ymiskar ætlanir verið á borðinum um, hvat bygningurin skal brúkast til.

## Fleiri fram við

Avgjørt er at selja, og bygningurin er lýstur til sølu.

Sigurd Simonsen, borgarstjóri, sigur, at áhugi er fyri at keypa bygningin.

– Tað eru fleiri, sum eru fram við, og vit hava fingið eini 2–3 rímiliga ítøkilig boð.

Borgarstjórin sigur, at hann hevur fingið til uppgávu frá bygdaráðnum at samskipa søluna, og tá ið greitt er, hvørji ítøkiligu boðini eru, verður málið lagt fyri bygdarráðið til støðutakan.

– Enn er eingin støða tikin til, hvør keyparin verður, sigur Sigurd Simonsen.

## Bassi áhugaður

Sosialurin hevur skilt, at millum áhugaðu keypararnir er Kristian Suni Jensen, vanliga róptur Bassi, sum eigur og rekur Haraldsen–fyritøkuna í Fuglafirði.

Men Bassi vil hvørki vátta ella avsanna, at hann liggur fram við at keypa gamla Snikkaravirkið á Kambsdali.

Sigurd Simonsen vil einki siga um, hvørjir áhugaðu keypararnir eru, og hann vil heldur einki siga um, hvat Fuglafjarðar kommuna roknar við at fáa fyri bygningin.

– Vit hava góða tíð til at selja bygningin, leggur borgarstjórin aftrat.



*Fuglafjarðar kommuna fer nú at selja gamla Snikkaravirkið á Kambsdali. – Fleiri eru áhugaðir, men vit hava einki at skunda okkum til, sigur borgarstjórin, Sigurd Simonsen*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*


*Óli P 70 ár*

Móttøka í Miðlahúsinum

Í sambandi við at Óli P verður 70 ár
týsdagin 24. januar
verður móttøka í Miðlahúsinum
henda dagin frá kl. 15 til 17.

Øll eru vælkomin



miðlahúsið
í Vágsbotni




*Flakatrolarin, Sundaberg, kom aftur av túri í gjár. Veiðan verður løgd upp á Kósini*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*

# Sundaberg afturkomin

**Flakatrolarin, Sundaberg, er komin aftur av túri. Teir leggja veiðina upp á Kósini**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Hanus Hansen, reiðari hjá JFK–Troli, sigur, at veiðan hendan túrin liggur um 430 tons í flaki.

– Sundaberg hevur verið burtur í einar níggju vikur, og hendan túrin hava teir bara roynt í russiskum sjógvi.

35 mans eru við skipinum, sum nú ger klárt at fara nýggjan túr.

Skipari hendan túrin hevur verið John Fuglø og á brúnni, nú teir fara avstað aftur, verður Brandur Joensen.

## Inni í Noregi

Hanus Hansen sigur, at hin flakatrolarin hjá felagnum, Skálaberg, júst hevur verið inni í Noregi og bunkrað olju.

Skálaberg byrjaði at fiska 11. desember í fjør.

Spurdur, hvat Skálaberg hevði inni, nú teir bunkraðu, sigur Hanus Hansen, at tað er hann ikki heilt greiður yvir.